# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Mín støða er, at Ukraina og Georgia eiga at sleppa upp í NATO, og Russland hevur ikki sýtingarrætt*

*George W. Bush*



## Bush bað um fleiri hermenn til Afghanistan

Sum væntað nýtti amerikanski forsetin, George W. Bush, høvi til at biðja um fleiri hermenn til Afghanistan, tá hann í morgun setti NATO-toppfundin í rumenska høvuðsstaðnum Bukarest.

Hann segði, at NATO hevur ikki ráð til at tapa bardagan við Taleban og al-Qaeda. Toppfundurin endar í morgin.

## Al Gore í fótasporum Saddam Hussein

**Í næstu viku kemur Al Gore til Íslands, og har skal hann gista umborð á marglætisskipinum hjá fyrrverandi irakska einaræðisharranum, Saddam Hussein**

Í dag eigur íslendingurin Pálmi Haraldsson gamla marglætisskipið hjá Saddam Hussein, og í gjár kom tað til Reykjavíkar.

Skipið er ikki ørindaleyst, tí ætlanin er, at fyrrverandi amerikanski varaforsetin, Al Gore, skal gista umborð á skipinum, tá hann í næstu viku kemur til Reykjavíkar at halda fyrilestur um umhvørvi og veðurlagsbroytingar. Fyrst skulu amerikanskir trygdarmenn kanna skipið væl og virðiliga, samstundis sum ymisk trygdartiltøk verða sett í verk umborð og nærhendis skipinum.

Summir íslendingar hava mótmælt, at eitt stuttleikaskip hjá Saddam Hussein sleppur at bryggju í Íslandi.



*Gamla skútan hjá Saddam Hussein kom skúmandi inn á Reykjavík gjáramorgunin*

*Mynd: Vísir*

## Børn funnu kvinnuhøvd á skotsku strondini

**Tvær skotskar smágentur funnu eitt kvinnuhøvd í fjøruni við býin Arbroath**

Tær báðar genturnar, sum eru systrar, spældu niðri í fjøruni, tá tær funnu eitt kvinnuhøvd í einum plastikkposa. Sambært løgregluni í Tayside varð ein hond eisini funnin í fjøruni við Arbroath, sum er á skotsku eysturstrondini.

Blaðið The Daily Record skrivar, at tær báðar systrarnar kvikaðu sær til hús og søgdu mammuni frá, hvat tær høvdu sæð niðri í fjøruni. Mamman ringdi alt fyri eitt til løgregluna, sum seinni váttaði, at hon hevði funnið eitt kvinnuhøvd og eina hond í fjøruni.

Løgreglan hevur nú avbyrgt fjøruna við Arbroath, og løgreglumenn vita, um fleiri likamslutir kunnu vera har. Samstundis hava foreldur fingið boð um at halda sínum børnum burturi frá strondini.

- Tað má vera skelkandi fyri børn at finna slíkt, og tí er umráðandi, at fleiri børn ikki fáa sama skelkin sum tær báðar systrarnar, sigur tinglimurin Andrew Walsh við blaðið The Guardian.

Skotska løgreglan hevur set serkøn at kanna likamslutirnar fyri at vita, um teir kunnu vera av onkrum persóni, sum er eftirlýstur, skrivar The Daily Record.



*Skotsk løgreglufólk leita eftir likamslutum niðri í fjøruni við Arbroath*

*Mynd: Polfoto*

### STUTT SAGT

#### Nýggjur ráðharri

Alexander Stubb tók í gjár við sum finskur uttanríkisráðharri eftir Ilkka Kanerva, sum noyddist at fara frá orsakað av fleiri ónæriligum sms-boðum, sum hann hevði sent einari strippdansarinnu. Sum uttanríkisráðharri tekur Alexander Stubb eisini við sum formaður í OSCE, har Finnland hevur formansskapin í løtuni. Alexander Stubb, sum fylti 40 í ár, hevur verið limur í Evropatinginum fyri Savningarflokkin, sum er partur av finsku stjórnarsamgonguni. Ilkka Kanerva var úr sama flokki.

#### Pelosi vil hava avgerð

Nancy Pelosi, sum er formaður í amerikanska umboðsmannatinginum, vil hava sínar floksfelagar í demokratiska flokkinum at semjast um, hvørt flokkurin skal stilla Barrack Obama ella Hillary Clinton upp í heyst. Tað sigur hon í samrøðu við BBC, men hon vil ikki siga, hvønn hon vil hava til valevni í novembur. Formaðurin í demokratiska flokkinum, Howard Dean, hevur sagt, at tað besta hevði verið, um flokkurin kundi staðið saman um eitt valevni sum skjótast. Fleiri demokratar hava biðið Hillary Clinton gevast við valstríðnum, men hon hevur sagt nei, og kappingarneyti hennara, Barrack Obama, hevur eisini sagt, at hann vil fegin hava hana at halda fram. Barrack Obama hevur savnað sær 1.631 valmenn og Hillary Clinton 1.501.

#### Leitaðu eftir Karadzic

Løgreglan í Bosnia rannsakaði í gjár húsini hjá Zeljko Maljukan og Dusko Mihajlovic, sum vóru lívverjar hjá fyrrverandi bosniaserbiska leiðaranum Radovan Karadzic í árunum frá 1992 til 1995. Bosnisku myndugleikarnir hava illgruna um, at teir báðir fyrrverandi lívverjarnir hava hjálpt Radovan Karadzic og fyrrverandi bosniaserbiska generalinum Ratko Mladic at fjala seg. Laradzic og Mladic eru eftirlýstir fyri grov krígsbrotsverk undir borgarakrígnum í Bosnia. Millum annað eru teir settir í samband við hópdrápið í býnum Screbrenica í 1995, har næstan 8.000 muslimar vórðu fyribeindir. Tað er ikki greitt, um húsarannóknin í gjár gav nakað úrslit.